Kunngerðablaðið A
2011 Hefti 25
ISSN 0907-905X

Nr. 87 20. juni 2011

**Kunngerð**
**um**
**gjald sum Vanlukkutryggingarráðið kann taka fyri vegleiðandi ummæli**

Við heimild í § 26, stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða verður ásett:

**§ 1.** Fyri vegleiðandi ummæli sum Vanlukkutryggingarráðið gevur um persónsskaða, sum ikki er fevndur av arbeiðsskaðatryggingarlógini, verður goldið til Vanlukkutryggingarráðið kr. 2.000,00 fyri hvørt ummæli.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Vinnumálaráðið, 20. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um ymsar eftirlitsuppgávur v.m. sum Arbeiðseftirlitið útinnir

### § 1

Í kunngerð nr. 120 frá 21. november 2005 um ymsar eftirlitsuppgávur v.m., sum Arbeiðseftirlitið útinnir, verður § 5 orðað soleiðis:

„**§ 5.** Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni útskrivar loyvisbrøv sbr. § 7, stk. 3 í kunngerð um loyvisbræv til kranar, gaffiltrukkar og onnur lyfti og flutningstól.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 20. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um gjøld fyri eftirlit v.m. hjá Arbeiðseftirlitinum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 121 frá 21. november 2005 um gjøld fyri eftirlit v.m. hjá arbeiðseftirlitinum, verður § 5 orðað soleiðis:

„**§ 5.** Gjøld fyri loyvisbrøv sbrt. § 5 í kunngerð um ymsar eftirlitsuppgávur v.m. sum Arbeiðseftirlitið útinnir, eru hesi:

1) Útskriva loyvisbræv (nýtt): kr. 1.000,-
2) Endurútskriva loyvisbræv: kr. 350,-
3) Umbýti av loyvisbrævi (frá øðrum landi): kr. 1.000,“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 20. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 90 20. juni 2011

# Kunngerð um handfaring og burturbeining av burturkasti

Við heimild í § 7, stk. 1, § 10, § 14, stk. 3, § 35, stk. 1, § 37, stk. 1 og § 66, 1. reglubrot í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, verður ásett:

*Øki*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri handfaring og burturbeining av burturkasti, sum verður heintað frá húsarhaldum, sjúkrahúsum, gistingarhúsum, virkjum, skúlum og barnagørðum o.l. og tá arbeiði verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara.

*Stk. 2.* Kunngerðin umfatar ikki:

1) burturkast av heilsuskaðiligum evni og tilfari o.l.,
2) burturkasti annars í sambandi við bygging/umbygging, og
3) burturkasti frá virkjum, heilsølum, handlum o.l.

*Stk. 3.* Stk. 2, nr. 1, 2 og 3 er tó ikki galdandi, um burturkastið verður heintað í posum ella ruskíløtum.

*Skyldur hjá arbeiðsgevara, arbeiðsleiðara og arbeiðsfólki*

**§ 2.** Arbeiðsgevari, sum setur arbeiðsfólk at heinta burturkast sambært § 1 skal síggja til, at arbeiðsfólkið er vart ímóti vanda fyri skaða á likam, ella skaðiligum árini á heilsuna.

**§ 3.** Arbeiðsgevarin skal kunna seg um viðurskiftini á teimum støðum, har heintan av burturkasti fer fram og skal skipa arbeiðið hareftir. Í tí sambandi skal tað vera møguligt hjá teimum, sum arbeiða við heintan av burturkasti, at fáa frálæru um arbeiðslig viðurskifti.

*Stk. 2.* Trygdarumboð skal luttaka í ráðlegging um skipan av arbeiðinum. Har eingin trygdarskipan er, skal arbeiðsfólkið sjálvt luttaka í ráðleggingini.

**§ 4.** Í tann mun tørvur er fyri tí, skal arbeiðsgevarin samskifta við kommunur og kommunalar felagsskapir um, hvussu arbeiðið skal skipast, m.a.:

1) skipan ella broyting av flutningsvegi og ruskplássi,
2) at støða ruskílat við ella á gongubreyt ella vegi og
3) fyrireiking av arbeiðinum at handfara og burturbeina burturkast.

**§ 5.** Tann, sum arbeiðsgevarans vegna leiðir ella hevur eftirlit við arbeiðinum ella partar av hesum, skal síggja til, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða hildnar.

*Stk. 2.* Verður arbeiðsleiðarin sbr. stk. 1 varugur við brek ella manglar, sum kunnu hava við sær vanda fyri skaða á likam ella skaðiligt árin á heilsuna hjá arbeiðsfólki, skal hesin beinanvegin fremja neyðug tiltøk fyri at fyribyrgja hesum.

*Stk. 3.* Er arbeiðsleiðarin ikki førur fyri at seta tey í stk. 2 nevndu tiltøk í verk, skal hann beinanvegin siga arbeiðsgevaranum frá.

**§ 6.** Arbeiðsfólkið skal virka fyri, at ásetingarnar í hesi kunngerð um at fremja trygdina og heilsuna, virka sum ætlað.

*Stk. 2.* Arbeiðsfólkið skal ansa eftir, at amboð, reiðskapur, tól og útgerð v.m. eru í lagi.

*Stk. 3.* Eru brek ella manglar við tí í stk. 2 nevnda, sum kann hava við sær vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna hjá arbeiðsfólki, sum hesi ikki sjálv eru før fyri at bøta um, skulu tey beinanvegin boða trygdarumboði, arbeiðsleiðara ella arbeiðsgevara frá.

*Fyriskipan av arbeiðinum*

**§ 7.** Kommunur og kommunalir felagsskapir sum, hava ábyrgd av at heinta burturkast, gera av, hvat tilfar og hvørji amboð verða nýtt í sambandi við heintanina av burturkasti, somuleiðis hvat burturkast verður heintað, sbr. tó § 1, stk. 2 og hvussu burturkastið verður skilt v.m.

**§ 8.** Í sambandi við bygging av sethúsum, virkjum og vinnubygningum, skúlum, barnagørðum o.l. skal arbeiðsgevarin ráðgeva arbeiðsfólki um heintan og burturbeining av burturkasti, sum er umfatað av § 1 soleiðis, at burturkastið kann heintast og burturbeinast uttan vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna hjá arbeiðsfólkinum.

*Útinnan av arbeiðinum*

**§ 9.** Tá vekt og skap av ruskílati ella posum gera tað neyðugt, ella tá meira enn ein posi ella eitt ruskílat verður flutt samstundis, skal hjálpiamboð nýtast, fyri at verja arbeiðsfólkið móti vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna.

*Stk. 2.* Sama er galdandi, tá slag av ruski og fráleiki millum ruskílat og innsavningarbilin, gera nýtslu av hjálpiamboði neyðugt.

*Stk. 3.* Um viðurskifti nevnd í stk. 1 og 2 eru háttað soleiðis, at tað ikki er møguligt at nýta hjálpiamboð, so kann ruskílat ella posi bert lyftast, dragast ella berast, um tað kann gerast uttan vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna hjá arbeiðsfólki sbr. §§ 13 og 14.

*Stk. 4.* Vandin fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna skal metast út frá teimum viðurskiftum, ið hava avgerandi týdning og skulu hesi viðurskifti takast við í ráðlegging og fyrireiking, tá arbeiðsháttur verður valdur.

*Stk. 5.* Viðurskifti, sum eru nevnd í stk. 1, 2 og 4 eru m.a.:

1) ruskílat harundir posi,
2) vekt og slag av ruski,
3) at støða og innrætta ruskílat,
4) fluttningsvegurin,
5) hjálpiamboð og
6) vandastøður.

*Stk. 6.* Tá hjálpiamboð verða nýtt, skal tryggjast, at persónur, sum brúkar egna orku til at trýsta, hála ella lyfta, kann gera tað uttan vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna. Í tí sambandi skal verða sæð til, hvussu fluttningsvegurin er háttaður, vektina av ruski, sum flutt verður og slag av hjálpiamboði, sum verður nýtt.

*Stk. 7.* Hjálpiamboð, íløt og innsavningarbilurin eiga at hóska saman í sambandi við heintingarskipanina.

**§ 10.** Tá hjálpiamboð verða nýtt í sambandi við arbeiði, skal hetta altíð verða gjørt í eini góðari arbeiðsstøðu og skal títtleikin av tílíkum arbeiði yvir ein dag vera hóskiligt.

*Stk. 2.* Hjálpiamboð skulu veljast út við atliti til, hvat ílat skal flytast, hvussu ílatið verður flutt og innsavningarbilin, sum verður nýttur.

**§ 11.** Tilfar, sum verður brúkt í sambandi við heintan av burturkasti, haruppií posar, skal ikki hava eginleikar, sum kunnu skaða húðina o.l.

*Stk. 2.* Arbeiðsfólk má ikki koma í samband við tilfar ella posar, sum kann skaða ella hava skaðiligt árin á húðina.

*Stk. 3.* Er vandi fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna av at koma í samband við burturkast, t.d. tá talan er um at bera posar, skal arbeiðsfólkið brúka serlig arbeiðsklæðir, harundir serligar vestar og persónliga verndarútgerð, sum t.d. handskar, verndarfótbúna o.l.

*Ruskílat og hvussu tað er støðað*

**§ 12.** Posi ella ruskílat skal standa á sløttum og verða støðað soleiðis, at ruskílatið ella posin kunnu takast og flytast uttan trupulleikar, somuleiðis at tað skal ikki vera neyðugt at bukka ella toyggja seg, fyri at koma til og frá staðnum.

*Flutningur av ruskílati ella posa og val av hjálpiamboðum*

**§ 13.** Viðurskifti nevnd í § 9 og onnur viðurskifti, sum hava ávirkan á flutningin av ruskílati ella posa og val av hjálpiamboðum, eru grundarlag fyri metingini av, hvussu arbeiðið skal skipast fyri at tryggja, at arbeiðið at savna inn rusk kann gerast á fult tryggan hátt.

**§ 14.** Vektin á ruskposum verður býtt upp soleiðis:
1) Bólkur A: Miðalvektin fyri ein posa, máld yvir ein dag, má ikki fara upp um 14 kg. Fyri einstakan posa má vektin ikki fara upp um 20 kg. Samanlagt fyri ein dag skal eitt arbeiðsfólk ikki lyfta og bera meira enn 3 tons.
2) Bólkur B: Miðalvektin fyri ein posa, máld yvir ein dag, má ikki fara upp um 9 kg. Fyri einstakan posa má vektin ikki fara upp um 20 kg. Samanlagt fyri ein dag skal eitt arbeiðsfólk ikki lyfta og bera meira enn 5 tons.

*Stk. 2.* Fráleikin millum innsavningarbil og har posin er støðaður, skal vera hóskandi í mun til vektina á tí einstaka posanum, sum verður lyftur ella borin.

*Stk. 3.* Fyri posarnar nevndar í stk. 1 er galdandi, at teir ikki eru skræddir.

*Flutningsøkið*

**§ 15.** Flutningsøkið og onnur viðurskifti viðvíkjandi ruskílati, posa og innsavningarbili skulu vera soleiðis háttað, at flutningur av ruskílati ella posa kann fara fram uttan vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna hjá arbeiðsfólkinum.

*Stk. 2.* Fyri at verja arbeiðsfólkið móti tí í stk. 1 nevnda vanda á flutningsøkinum er galdandi, at:
1) økið skal vera slætt við føstum undirlagi og ikki hált,
2) hurðar, portur o.l. á girðingum til ruskstað skulu kunna standa opin og hava slíka hædd og breidd, at flutningur kann fara fram uttan ampa,
3) stoyttrin o.l. skulu hava fastar skrákílar o.l., so flutningur við t.d. sekkjavogni er møguligur,
4) økið skal vera ljóst (min. 20 lux) og ruddað, harundir ruddað fyri kava, og avísað.

*Stk. 3.* Eisini er galdandi, at:
1) burturkast ikki má koyrast leyst í ruskposa, men vera innballað ella verða koyrt í ein plastposa (beriposa) e.l. Burturkast at nýta til reinføri skal altíð vera í afturlatnum plastposa, áðrenn tað verður koyrt í ruskposan,
2) ruskposin má ikki vera ovfyltur og er posin at rokna sum fyltur, tá 20 cm eru eftir upp til posakantin.

*Serlig viðurskifti*

**§ 16.** Um so er, at burturkastið ikki kann heintast orsakað av, at ásetingarnar í § 15 ikki eru uppfyltar, kann burturkastið bert heintast av arbeiðsfólkinum, um tað er sett so nær vegnum, sum til ber og hetta ikki hevur við sær vanda fyri skaða á likam ella skaðiligum árini á heilsuna.

**§ 17.** Eru tekniskar orsøkir, ella eru serlig húsaviðirskifti, t.d. friðaðir bygningar, bygningar í fleiri hæddum e.l. sum gera tað ómøguligt, at ásetingarnar í § 15 kunnu fylgjast, skal arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í samráð við Arbeiðsumhvørvisráðið gera leiðreglur um loysnir, sum kunnu brúkast í staðin.

*Vælferðarfyriskipanir*

**§ 18.** Arbeiðsgevarin skal síggja til, at arbeiðsfólkið hevur atgongd til:
1) baðirúm við møguleika til at fara í brúsu,
2) vesi,
3) hóskandi stað, har til ber at fáa sær at eta,

4) smárúm til vanlig klæði og persónligar ognarlutir og annað smárúm til arbeiðsklæði og
5) rúm at turka klæði, um tey verða vát.

**§ 19.** Fyri ásetingarnar í § 18, nr. 1-5 er galdandi sum niðanfyri tilskilað:
1) Hentleikarnir skulu vera á hóskandi innsavningarstaði við atliti til, hvar arbeiðið verður gjørt og skulu hentleikarnir vera lætt atkomuligir.
2) Hentleikarnir skulu vera settir upp í hóskandi eind ella eindum og støðað á tryggan hátt. Turrvesi skulu vera líka rein sum vesi við vatnskoli. Um hjólskúrur ella tílík eind verður sett til meira enn 4 persónar at nýta, skulu vesi sambindast við búrennnu, har hetta er møguligt.
3) Er savningarstaðið í fyritøkuni hjá arbeiðsgevaranum, skulu hentleikarnir lúka krøvini um vælferðarfyriskipanir á føstum arbeiðsplássum. Er talan um flytandi innsavningarstað og hjólskúrar verða nýttir, skulu hentleikarnir lúka krøvini, sum eru ásett í § 18 og § 19, stk. 1, nr. 1 og 2, um slíkar.

*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1, nr. 1, 2 og 3 kunnu eisini setast saman so sum er best hóskandi, sbr. tó § 20.
*Stk. 3.* Arbeiðsfólkið skal kunna vaska sær í heitum vatni. Eisini skal arbeiðsfólkið kunna vaska sær við egnaðum reinsievni sum sóttreinsar evni, ið kann hava dálkingar ella smittuvanda við sær.

**§ 20.** Um ikki ber til at brúka hentleikar, nevndir í § 19 orsakað av arbeiðsumstøðunum, skal arbeiðsgevarin tryggja sær, at arbeiðsfólkið hevur atgongd til teir í § 18 nevndu hentleikar á annan eins líka tryggan hátt.

*Kærur*

**§ 21.** Avgerðir, tiknar av arbeiðseftirlitinum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sambært hesi kunngerð, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

*Revsing*

**§ 22.** Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari lóggávu, verður við bót hann revsaður,
1) sum fremur brot á § 2, § 3, stk. 1, § 5, stk. 1, 2 og 3, § 6, stk. 1 og § 8,
2) ikki ger eftir boðum, givin eftir hesi kunngerð, ella
3) setir til viks treytir fyri frávik eftir hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Fyri brot, sum verða framd av løgfrøðiligum persóni, sum t.d. partafelagi ella lutafelagi, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur.
*Stk. 3.* Er brotið framt av landinum, einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, kann landið, kommunan ella kommunali felagsskapurin verða sektað.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 23.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2011.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 18 koma tó í gildi 1. desember 2011.

Vinnumálaráðið, 20. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

# Kunngerð
# um
# loyvisbræv til kranar, gaffiltrukkar og onnur lyfti- og flutningstól

Við heimild í § 35, stk. 1 nr. 3, § 63 og § 66, í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000, um arbeiðsumhvørvi verður ásett:

*Kranar og lyftitól*

**§ 1.** Mekaniskt riknir kranar og líknandi lyftitól, ið kunnu lyfta eina byrðu uppfrá og sum hava í minsta lagi eina mekaniska rørslu, umframt at kunna lyfta og lora, kann bert passast av persóni, ið hevur loyvisbræv at passa hesi tól.

*Stk. 2.* Kravið um loyvisbræv sambært stk. 1 er ikki galdandi fyri:

1) Kranar og líknandi lyftitól, t.d. traverskranar, har lastin av byrðuni altíð er innanfyri stuðulsøkið hjá krananum, soleiðis at byrðan ikki kann fáa kranan at koppa. Mest loyvda lastin er 5 tons.
2) Konsolkranar, har mest loyvda lastin er 5 tons.
3) Lastbilakranar, har mest loyvda lastin ikki fer upp um 8 tonsmetrar.
4) Kranar og líknandi lyftitól, har byrðan verður flutt soleiðis, at hetta ikki kann hava við sær, at persónar kunnu koma til skaða, um byrðan dettur ella fer at sveiggja.
5) Kranar og líknandi lyftitól, ið verða nýtt til seriulyft við einum til endamálið gjørdari lyftiútgerð, so sum at lyfta evnir í einari ávísari arbeiðsgongd, og har lyftihæddin í mesta lagi er 1,5 m frá undirlendinum.

*Stk. 3.* Kravið um loyvisbræv er heldur ikki galdandi fyri entreprenørmaskinur, ið kunnu nýtast sum kranar í sambandi við teirra vanligu arbeiðsuppgávu, um so er, at:

1) eingir persónar eru tætt hjá, tá byrðan verður lyft, flutt ella sett. Tó er loyvt at stýra byrðuni upp á pláss tá hon verður sett,
2) byrðan ikki verður lyft hægri enn 1 metur yvir undirlendi,
3) maskinurnar verða eftirhugdar og viðlíkahildnar sambært ávísing veitaranna, og
4) veitarans brúkara- og viðlíkahaldsávísingar eru í maskinuni.

*Stk. 4.* Undantøkini í stk. 2 og 3, tó ikki stk. 2, pkt. 4, eru ikki galdandi fyri samlyft av byrðum og at lyfta persónar.

*Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar*

**§ 2.** Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, ið hava mekaniska byrðalyfting øðrumegin við loddrættari mastur (stólpa) og hava mekaniska koyring, kunnu bert passast av persónum, ið hava loyvisbræv at passa hesi tól.

*Stk. 2.* Kravið um loyvisbræv sbr. stk. 1 er ikki galdandi fyri:

1) Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, har lyftihæddin er í mesta lagi 1 m lyftihædd.
2) Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, sum eru stýrdir av skinnarum e.ø. undir, til síðuna ella yvir, t.d. sporbundnir heintitrukkar ella hillastáplarar.
3) Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, umborð á skipum ið verða passaðir av manningini.
4) Landbúnaðartraktorar við gaffillyftibúnaði ella líknandi útgerð, ið lyfta byrðuna øðrumegin við loddrættari mastur (stólpa), tá ið mesta lyftihædd ikki fer upp um 3,3 m og tann, ið passar tólið, hevur í minsta lagi loyvisbræv at føra traktorar. Lyftarin eigur bert at verða nýttur til jarðarbeiði og kann ikki av maskinstøðum o.t. verða útleigaður við fólki til vinnuligt endamál.

*Stk. 3.* Gaffiltrukkar, ið hava ásettan kranaarm, ið kann røra seg sjálvstøðugt, mugu bert passast av persónum, ið hava kranføraraloyvisbræv.

*Teleskoplessari*

**§ 3.** Teleskoplessarar, ið hava mekaniska lyfting av byrðuni plaseraða á gaflum við endan á armi, ið kann skjótast aftur og fram, mugu bert passast av persónum, ið hava loyvisbræv at passa gaffiltrukk.

*Stk. 2.* Teleskoplessarar, ið eru útgjørdir til at kunna nýtast til kranaarbeiði, mugu bert passast av persónum, ið hava loyvisbræv til at passa krana.

*Stk. 3.* Stk. 2 er tó ikki galdandi fyri teleskoplessarar, ið hava ásettan oka til bingjur, og sum verða nýttir á farmastøðum. Til tað krevst loyvisbræv til gaffiltrukk.

*Sløg av loyvisbrøvum*

**§ 4.** Á fylgiskjali 1 sæst hvørji sløg av loyvisbrøvum ein persónur skal hava fyri at kunna passa (føra) ein krana, gaffiltrukk, gaffilstáplara, teleskoplessara ella annað tól.

*Stk. 2.* Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni dagførir nýggj lyftitól á fylgiskjali 1 eftir tørvi.

*Krøv til loyvini*

**§ 5.** Arbeiðsgevarin skal síggja til, at teir persónar, ið passa frammanfyri nevndu tól, hava neyðug loyvisbrøv sum svara til viðkomandi tól.

**§ 6.** Loyvisbrøv sambært hesi kunngerð kunnu einans gevast persónum, ið:

1) eru fyltir 18 ár,
2) kunnu vísa læknaváttan, ið prógvar, at teir eru skikkaðir til at passa hesi tól, og
3) hava staðið ástøðiliga og verkliga roynd í at passa tólini.

*Undirvísing*

**§ 7.** Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni setur krøvini til royndirnar fyri tey ymsu sløgini av loyvisbrøvum.

*Stk. 2.* Í samráð við Arbeiðsumhvørvisráðið ger arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni leiðreglur fyri snið, innihald og tíðarbrúk til frálæru at kunna passa tey ymsu lyftitólini.

*Stk. 3.* Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skrivar út loyvini grundað á prógv frá skúla, sum er góðkendur av arbeiðseftirlitinum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

*Afturtøka*

**§ 8.** Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kann taka eitt loyvisbræv aftur, varandi ella fyri ávísa tíð, um tann, ið passar eitt tól, við grovum ósketni, ella av heilsuligum orsøkum, verður mettur ógnaður til tess.

*Stk. 2.* Um mett verður, at persónur, sum hevur mist loyvisbrævið sbrt. stk. 1, aftur er egnaður at hava loyvisbræv, skal persónurin standa nýggja roynd.

*Frávik og kæra*

**§ 9.** Arbeiðseftirlitið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kann í einstøkum førum loyva frávik frá hesi kunngerð, tá hetta verður mett rímiligt og ráðiligt. Tá mett verður, um frávik skal gevast, skal vekt leggjast á hesi viðurskifti:

1) væntandi møguleikar at leggja arbeiðið til rættis,
2) vavið av uppgávuni, hvussu leingi hon varir og hvussu vandamikil hon er,
3) møguleikan fyri, at aðrir við loyvisbrævi ikki kunnu útinna uppgávuna, og
4) tað upplæring og vegleiðing, ið viðkomandi kann fáa.

**§ 10.** Avgerðir, tiknar av arbeiðseftirlitinum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir hesi kunngerð, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

*Revsing*

**§ 11.** Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari lóggávu, verður við bót, hefti ella fongsli í upp til eitt ár, hann revsaður, ið:

1) fremur brot á § 1, stk. 1 og stk. 4, § 2, stk. 1 og stk. 3, § 3, stk. 1 og stk 2 og stk. 3, § 4, stk. 1 og § 5,
2) ikki ger eftir boðum, givin eftir hesi kunngerð, ella
3) setir til viks treytir fyri frávik eftir hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Fyri brot á § 4, stk. 1 kann arbeiðsgevarin verða sektaður við bót, sjálvt um brotið ikki kann roknast gjørt við vilja ella ósketni.

*Stk. 3.* Fyri brot, sum verða framd av løgfrøðiligum persóni, sum t.d. partafelagi ella lutafelagi, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur.

*Stk. 4.* Er brotið framt av landinum, einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, kann landið, kommunan ella kommunali felagsskapurin verða sektað.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2011.

*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi kunngerð nr. 89 frá 12 november 1979 um kranføraraprógv við seinni broytingum og kunngerð nr. 59 frá 18. juli 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk við seinni broytingum.

*Stk. 3.* Ásetingarnar í § 3, stk. 1 og 3 koma tó fyrst í gildi 1. januar 2012.

*Stk. 4.* Kranføraraprógv B, D og E geva rætt til at passa teleskoplastarar til 1. januar 2012.

Vinnumálaráðið, 20. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

**Skjal nr. 1**

**Loyvisbrøv til kranar, gaffiltrukkar og onnur lyfti- og flutningstól**

| Slag av loyvisbrævi | Kranaslag | Onnur tól | Sambærligt við onnur loyvisbrøv |
|---|---|---|---|
| **A** | Tårndrejekraner (byggekraner), havnekraner (skinnekørende), svingkraner, højbanekraner, skibsværftskraner o.l. | | A-certifikat gælder også for C-kraner. |
| **B** | Mobilkraner | Slæbeskovlsmaskiner, der bruges som kran. | B-certifikat gælder også for C-kraner og entreprenørmaskiner, der bruges som kran.<br><br>B-certifikat erhvervet før den 1. januar 2000 gælder også for D- og E-kraner.<br><br>B-certifikat gælder også for teleskoplæssere med gafler |
| **C** | Certifikatkrævende kraner, fx portalkraner og traverskraner undtagen kraner nævnt under A, B, D, E og G. | | |
| **D** | Lastbilmonterede kraner over 8 tonsmeter til og med 25 tonsmeter. | Traktormonterede kraner, der bruges til af- og pålæsning af gods, kræver D-certifikat, når den tilladelige belastning er over 8 tonsmeter til og med 25 tonsmeter.<br><br>Ved andet end af- og pålæsningsarbejde, kræves D-certifikat op til 25 tonsmeter.<br><br>Teleskoplæssere op til 25 tonsmeter, der indrettes og bruges til kranarbejde.<br><br>Gaffeltrucks monteret med selvstændig bevægelig kranarm kræver D-certifikat op til 25 tonsmeter. | D-certifikat gælder også for C-kraner og entreprenørmaskiner, der bruges som kran.<br><br>D-certifikat gælder også for teleskoplæssere med gafler.<br><br>D-certifikat gælder også for teleskoplæsser monteret med løfteåg til containere, og som anvendes i terminalområder. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **E** | Lastbilmonterede kraner over 25 tonsmeter. | Traktormonterede kraner, kræver E-certifikat, når den tilladelige belastning er over 25 tonsmeter.<br><br>Teleskoplæssere over 25 tonsmeter, der indrettes og bruges til kranarbejde.<br><br>Gaffeltrucks monteret med selvstændig bevægelig kranarm kræver E-certifikat over 25 tonsmeter. | E-certifikat gælder også for C- og D-kraner og entreprenørmaskiner, der bruges som kran.<br><br>E-certifikat gælder også for teleskoplæsser med gafler.<br><br>E-certifikat gælder også for teleskoplæsser monteret med løfteåg til containere, og som anvendes i terminalområder. |
| **G** | Entreprenørmaskiner, der bruges som kran. | | |

**Gaffiltrukkar o.l.**

| **Slag av loyvisbrævi** | **Tekniskt hjálpartól** |
|---|---|
| **A** | Gaffelstabler, der kan betjenes gående (førerstangsgaffeltruck, evt. med ståplade). |
| **B** | Gaffeltruck, som føreren skal stå eller sidde på.<br><br>Traktorer med gaffelløfteraggregat eller med lignende udstyr, der løfter byrden langs en lodret mast.<br><br>Teleskoplæsser som har mekanisk løft af byrden placeret på gafler for enden af en udskydelig arm.<br><br>Teleskoplæsser monteret med løfteåg til containere, og som anvendes i terminalområder. |

**Teleskoplessarir**

| **Slag av loyvisbrævi** | **Teknisk hjálpartól** | **Sambærligt við onnur loyvisbrøv** |
|---|---|---|
| **A** | Teleskoplæssere, som har mekanisk løft af byrden placeret på gafler for enden af en udskydelig arm.<br><br>Teleskoplæsser monteret med løfteåg til containere, og som anvendes i terminalområder. | A-certifikat gælder også for traktorer med gaffelløfteraggregat eller med lignende udstyr, der løfter byrden langs en lodret mast. |
| **B** | Teleskoplæsser, der indrettes og bruges til kranarbejde. | B-certifikat gælder også for teleskoplæsser monteret med løfteåg til containere, og som anvendes i terminalområder. |

**Onnur teknisk hjálpartól**
**Vísandi til § 4, dagførir Arbeiðseftirlitið nýggj lyftitól v.m. eftir tørvi**

| Slag av loyvisbrævi | Teknisk hjálpartól | Sambærligt við onnur loyvisbrøv |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

Nr. 92 21. juni 2011

**Kunngerð**
**um**
**tíðaravmarkaða veiði eftir botnfiski á Føroya Banka í 2011**

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 3, § 9 b, stk. 5, § 29, stk. 2, § 36, stk. 2 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

**§ 1.** Eftir umsókn og við fiskiloyvi frá Fiskimálaráðnum er loyvt bátum undir 15 tons, sum hava rætt til fiskiloyvi í bólki 5, sbrt. § 28, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap, at royna við snellu, snøri ella tráðu á Føroya Banka til og við 31. august 2011.

**§ 2.** Bátar við fiskiloyvi, sbrt. § 1, kunnu fiska innan fyri eitt samlað dagatal upp á 80 fiskidagar. Fiskiskapurin skal steðga, tá hesir dagar eru brúktir.

**§ 3.** Fyri bátar við fiskiloyvi, sbrt. § 1, telur hvør túrur ein fiskidag, hóast túrurin er meira enn 24 tímar.

**§ 4.** Skipari/formaður á báti við fiskiloyvi, sbrt. § 1, sum fer á Føroya Banka, skal boða Fiskiveiðieftirlitinum frá á telefon 316913, tá farið verður úr havn, og tá komið er aftur í havn.

**§ 5.** Bátar við fiskiloyvi, sbrt. § 1, skulu hava eina av Fiskiveiðieftirlitinum góðkenda fylgisveinaútgerð umborð, sum til eina og hvørja tíð kann upplýsa um knattstøðuna hjá bátinum. Farið verður fram eftir somu treytum og mannagongdum, sum eru ásettar í kunngerð um eftirlit við fiskiførum um fylgisvein.

**§ 6.** Brot á §§ 4 og 5 verða revsað við bót.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. august 2011.

Fiskimálaráðið, 21. juni 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705